**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 26. august 2008, kl. $19^{00}$**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen, Pauli Trond Petersen, Jákup Oluf Hansen, Marjun S. Olsen og Jóhan Simonsen.
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

**Mál 59**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um byggisamtykt og bygdarskipan fyri Vestmanna Kommunu.
J.nr. 2005-568
Nevndin viðgjørdi á fundi 22. juli 2008 uppskot um byggisamtykt og bygdarskipan fyri Vestmanna kommunu, og samtykti við ymsum broytingum at mæla Bygdarráðnum til at samtykkja uppskotini.

**Viðv. mál 59**
Tekniski leiðarin kunnaði um broytingarnar í bygdarskipanini og byggisamtyktini.
Tilmælið einmælt samtykt.
Marjun Olsen viðmerkti, at tað eigur at verða tikið við í byggisamtyktina, at rørslutarnað eiga at hava somu atkomu-møguleikar sum onnur.

**Mál 60**
Fjalsvegur miðteinurin.
J.nr. 2005-322
Pauli T. Petersen heitir á Bygdarráðið um at taka spurningin viðv. miðteininum á Fjalsvegi upp til viðgerðar.
Fundurin má taka støðu til, um málið kann viðgerast uttan nevndar-viðgerð.

**Viðv. mál 60**
Pauli T. Petersen greiddi frá málinum. Miðteinurin er sera illa farin. Arbeiðið at slætta vegin og asfaltera vegin er mett at kosta 450.000,- kr. Pauli T. Petersen mælir til, at Bygdarráðið samtykkir at játta at gera vegstrekkið.
Jón Mikkelsen skeyt upp, at málið verður tikið upp á komandi fundi í Teknisku nevnd. Álagt verður Teknisku nevnd at koma við einum tilmæli til komandi Bygdarráðsfund.
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 61**
Tilmæli frá Teknisku nevnd til umsókn frá Bjarna Dánjalsson Jacobsen og Durtia Hansen um marknaumskipan ímillum ognir teirra matr. nr. 1g og 291.
J. nr. 2005-539
Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. mál 61**
Tilmælið einmælt samtykt.